

Deepwater Horizon brennir. Mynd: EPA/US COAST GUARD

# Norski oljugrunnurin stevnir BP eftir milliardum

**Jógvan Hugo Gardar**

24.12.2014 - 14:00

Oljan.fo

Norski oljugrunnurin hevur stevnt bretska oljufelagnum BP fyri rættin í Texas, og krevur eitt risaendurgjald fyri tað grunnurin misti av virðum í BP-partabrøvum aftaná Deepwater Horizon-vanlukkuna í apríl 2010.

Sambært norska blaðnum Dagbladet ynskir oljugrunnurin ikki at nevna upphæddina grunnurin meinar at hann hevur mist. Virði á BP-partabrøvunum hjá norska oljugrunninum lækkaði við umleið átta milliardum krónum út á heysti í 2010, orsaka av vanlukkuni í Meksikoflógvanum.

- Vit hava saman við øðrum stórum evropeiskum og amerikanskum íleggjarum sent eina stevning til rættin í Texas. Vit meina at BP kom við skeivum upplýsningum um trygdina á sínum oljuætlanum á djúpum vatni, og um evnini hjá fyritøkunum at tryggja slíkar ætlanir. Hetta hevur gjørt at umhvørvi hevur fingið stóran skaða, og íleggjararnir hava mist nógvar pengar, sigur kunningarleiðarin hjá oljugrunninum, Thomas Sevang, í samrøðu við Dagbladet.

*LES EISISNI:* *BP vil hava lægri bót fyri vanlukkuna í Meksikoflógvanum*

BP góðtekur ikki kravið. Oljulekin í Meksikoflógvanum gjørdi at fimm milliónir føt av olju endaðu í havinum, og spjaddist um eitt 3200 ferkilometra stórt øki. Hetta er størsti oljulekin í USA nakrantíð.

BP stríðist við at avmarka hvussu stórt endurgjald fyritøkan skal gjalda. Higartil hevur vanlukkan kostað BP umleið 42 milliardir dollarar, svarandi til einar 260 milliardir krónur.